

BRENNIR TÚ FYRI
VITAN OG MENNING?

# BÓKASAVNSVØRÐUR

## TIL FUGLAFJARÐAR BÓKASAVN

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

Vit kunnu bjóða tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv sum bókavørður, har tú stendur á odda fyri at veita borgarunum í Fuglafjarðar kommunu eina framkomna og tíðarhóskandi bókasavnstænastu.

### STARVIÐ

Sum bókavørður er tín uppgáva at tryggja eitt høgt og tíðarhóskandi tænastustig, og í tøttum samstarvi við mentanarleiðarin menna stovnin, tænastur og samstarv sum heild.

Høvuðsuppgávurnar hjá bókavørðinum eru:

- At menna og íverkseta tiltøk saman við mentanartoyminum
- At umsita bókarøkt og savnsrøkt
- At standa fyri átøkum innan miðlan av tilfari og tilboðum bókasavnsins
- At skipa fyri almennum tiltøkum, sum vekja áhuga fyri bókmentum, mentan og vitan
- At menna bókasavnið sum vitanardepil

### FØRLEIKAKRØV O.A.

Umsøkjarin skal vera útbúgvin bókavørður. Eisini krevst góður kunnleiki til og førleiki at nýta og vegleiða onnur at nýta bókasavnsskipanir.

### PERSÓNLIGIR EGINLEIKAR

Umráðandi er, at umsøkjarin er víðskygdur og hevur bæði fakliga og menniskjaliga góðar eginleikar. Viðkomandi skal vera fyrikomandi og tænastuhugað/-ur, taka sjálvstøðugar avgerðir og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar. Eisini skal umsøkjarin duga væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis.

### SETANARVIÐURSKIFTI

Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

### UM TÚ YNSKIR AT VITA MEIRA

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Rønn Eliasen, mentanarleiðara, tel 238014.

### UMSÓKNIN

Umsóknin skal, saman við prógvum og møguligum ummælum, sendast til info@fuglafjordur.fo í seinasta lagi 8. apríl 2019 kl 12:00. Á umsóknini skal standa: Bókavørður til Fuglafjarðar bókasavn.

KREA